## VIÐMERKINGAR

# Uttanríkispolitiska lógin merkir virknari uttanríkispolitikk

**Jóannes Eidesgaard**
*løgmaður*



Uttanríkispolitiska lógin víðkar okkara møguleikar at samráðast okkara egna vegna. Lógin gevur okkum møguleikan at menna ein munandi meira sjálvstøðugan og sjónligari leiklut á uttanríkispolitiska pallinum.

Við nýggju uttanríkispolitisku lógini verður tað ikki longur neyðugt at biðja um fulltrú úr Keypmannahavn, tá vit samráðast og gera sáttmálar við onnur lond og millumtjóðafelagsskapir, tá tað snýr seg um málsøkir, vit sjálvi ráða yvir.

Tað verður ikki longur eitt krav, at danska uttanríkistænastan skal luttaka í samráðingunum, soleiðis sum tað higartil hevur verið eftir heimastýrislógini. Mannagongdin hevur nevniliga verið, at danska uttanríkismálaráðið í hvørjum einstøkum føri hevur skulað mett, um tað er í samsvari við áhugamál ríkisins at lata føroyingum samráðingarheimildina, eisini hóast talan hevur verið um samráðingar um yvirtikin málsøki. Og tað hevur verið eitt krav, at danska uttanríkistænastan skal luttaka í samráðingunum. Hesar reglur hava gjørt tilgongdina bæði stirvna og tunga. Ofta hevur tað tikið drúgva tíð at fáa svar úr Danmark, og tað hevur í fleiri førum beinleiðis skaðað uttanríkisáhugamálum okkara. Nýggja lógin ruddar upp í hesum viðurskiftum nú føroyska uttanríkistænastan fer at hava beinleiðis diplomatiskt samskifti við aðrar uttanríkistænastur. Hetta geldur eisini løgfrøðiliga bindandi skrivligt samskifti millum Føroyar og onnur lond.

**Løgmaður skrivar nú undir**

Higartil hevur danski uttanríkisráðharrin undirritað sáttmálarnar fyri Danmarkar ríkið og fevnandi um Føroyar. Løgmaður hevur havt møguleikan at seta sína undirskrift á sáttmálan eisini, men hansara undirskrift hevur ikki havt nakað altjóðarættarligt gildi – tí hann bert hevur verið medundirritari hjá donsku myndugleikunum.

Nú verður tað løgmaður einsamallur – saman við sínum útlendska starvsbróðuri – ið skrivar undir sáttmálar Føroya við onnur lond. Løgmaður verður ikki longur bert ein medundirritari. Hansara undirskrift verður altjóða bindandi. Hetta er eitt stórt framstig í mun til verandi støðu!

Nógv teir flestu sáttmálar eru stjórnarsáttmálar. Sum dømi um stjórnarsáttmálar eru okkara fríhandilssáttmálar, eitt nú við ES, og rammusáttmálar um fiskirættindi. Í øllum hesum sáttmálum fer "Føroya landsstýri" at standa í sáttmálaheitinum saman við stjórnini hjá landinum vit gera sáttmála við.

Tá løgmaður hinvegin skrivar undir sáttmálar har ríkisnøvnini verða nevnd, kemur at standa "Danmarkar kongsríki Føroyum viðvíkjandi". Hetta er ein staðfesting av, at løgmaður her undirritar sáttmála, sum er galdandi fyri tann partin av ríkinum, ið er okkara – Føroyar. Hetta merkir sjálvandi at løgmaður ikki skrivar undir vegna eitt sjálvstøðugt ríki, tí vit eru ikki eitt sjálvstøðugt ríki. Í førum har vit fara at gera sáttmálar saman við grønlendingum kemur at standa; "Danmarkar kongsríki Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi".

**Sjálvstøðugan limaskap**

Vit kunnu í ávísum førum fáa limaskap og atlimaskap í millumtjóðafelagsskapum, sum hava samtyktir, ið loyva tí, og tá tað ikki er í stríð við støðu okkara í ríkisfelagsskapinum. Nú kunnu Føroyar sjálvar søkja sær limaskap – tað er ikki longur Danmark, sum skal søkja fyri Føroyar.

Lógin víðkar eisini munandi um okkara møguleikar at hava sendimenn í øllum londum og millumtjóðafelagsskapum, har Danmark í dag er umboðað, og ikki sum í dag, bert í londum har vit hava "serlig vinnulig áhugamál".

Ein hjáveiða við uttanríkispolitisku lógini kann væl verða, at tað fer at gerast lættari hjá føroyskum meginfeløgum at fáa limaskap í ikki-stjórnarligum millumtjóðafelagsskapum eitt nú innan mentan ella ítrótt. Tí, gerast vit meira sjónlig, fara slíkir felagsskapir at geva Føroyum størri ans og við hesum fylgir helst størri vælvild til føroysk ynski um limaskap.

**Danir bundið seg**

Tað er ikki løgið, um fólk flest eru ørkymlaði, nú harðar røddir vilja vera við, at uttanríkispolitiska lógin er eitt afturstig. Men tann, sum sigur tað, hevur annaðhvørt misskilt lógina ella hevur ikki lagt seg eftir at skilja hana. Við lógini skriva danir undir uppá, at teir geva føroyingum víðkaðar heimildir á uttanríkispolitiska økinum. Okkara myndugleiki á økinum verður nú staðfestur í lóg, heldur enn í óvissari fulltrú frá donskum uttanríkisráðharra!

**Vit vilja, og vit fáa ávirkan**

Lógin opnar ikki øll portur á víðan vegg til umheimin. Uttanríkispolitikkur er framvegis danskt málsøki. Antin einum dámar tað ella ikki, er tað ein veruleiki, at Løgtingið samtykti hetta í 1948, tí tá varð heimastýrislógin samtykt við eini áseting í § 5 um, at uttanríkismál eru felagsmál. Tað er veruleiki, vit mugu fyrihalda okkum til. Ræði á uttanríkismálum er eisini eitt hitt fremsta eyðkenni hjá einum fullveldisríki. Tí gevur hendan lógin heldur ikki føroyingum óavmarkað vald á hesum øki. At yvirtaka uttanríkismál er jú tað sama sum at loysa frá Danmark og tað er ikki dagsskráin hjá hesi samgongu.

Men lógin er eitt amboð, sum víðkar okkara møguleikar at samráðast okkara egna vegna, og tíðin fer skjótt at vísa at so er. Nýta vit lógina til fulnar, verður ein sjálvstøðugur leiklutur í uttanríkispolitikki ein víðgangandi siðvenja.

Uttanríkispolitiska lógin, sum í løtuni verður viðgjørd í Løgtinginum, gevur okkum vissuliga møguleikan at taka við størri uttanríkispolitiskari ábyrgd - og tað er tað, vit vilja!

# Ærast tann ið ærast vil!

**Hans Eiler Hammer**
*Sóknarprestur*

Tað er áhugavert at lesa grein í sosialinum hin 7.mai 2005 um konfirmatiónir í Mikladals kirkju í 1825, sum Andrass F. Joensen hevur skrivað!

Tó er tað undrunnarvert, at Andrass F. Joensen hevur skrivað eina slíka grein uttan at hava tosað við prestin, sum hann metir hevur mistikið seg í hesum máli! Sum skilst hevur Andrass F. Joensen tosað við fleiri onnur um hetta mál, ístaðin fyri rætta viðkomandi! Men ærast hann ið ærast vil fyri at koma við "røttum" árstølum! Eisini undrast undirritaði yvir at Sosialurin setur hesa grein á prent, uttan at biðja um eina viðmerking frá undirritaða, sum bar skeivt árstal fram undir prædiku síni Páskadag í ár. Tí varð biðið um eina viðmerking, so slapst undan hesi grein.

Undirritaði vil tó gera vart við, og eisini upplýsa Anndrass F. Joensen um, at sambart teimum kirkjubøkrum sum undirritaði í dag hevur atgongd til, so hevur eingin konfirmatión verið í Mikladals kirkju í tíðarskeiðinum 1893 - 2004.

Blaðfólk á Dimmu hevði áðrenn konfirmatiónina Páskadag gjørt sær gjøllan ómak at kanna eftir í kirkjubókunum á Landsskjalasavninum um nær seinasta konfirmatión var í Mikladals kirkju. Hon kom fram til 1799. Hetta stóð at lesa í Dimmalætting fáar dagar undan konfirmatiónini Páskadag 2005. Eina tøkk skal hon her hava fyri tann ómak hon gjørdi sær! Hetta var til stóra hjálp fyri undirritaða í fyrireikingunum til konfirmatiónina, sjálvt um árstalið nú vísir seg at verða skeivt!

Andrass F. Joensen hevur eftir øllum at døma verið vitandi um árstalið 1799 ÁÐRENN konfirmatiónina páskadag. Tí sum kunnugt var ein av konfirmantunum henda Páskadag ein sum Andrass F. Joensen sjálvur er abbabeiggi til. Tí er tað undrunnarvert at Andrass F. Joensen kemur við hesi rætting nú? Hann hevur havt fleiri høvi til at rætta hetta yvir fyri teimum sum hava rættingina fyri neyðuni. Tí er tað neyvan av tilvild, at Landsskjalasavnið drálar við at senda undirritaða umbidna avritið av kirkjubókini úr Norðoya Kirkjubók 1817 -1832 av konfirmantum í Mikladals kirkju, sama tíðarskeið, til greinin hjá Andrass F. Joensen HEVÐI staðið uppá prent! Tí sum kunnugt hevur Andrass F. Joensen dagliga tætt tilknýtið til Landsskjalasavnið!

Trupulleikin við hesum yvirlitið er tó, at tað vísir ikki 8 konfirmantar, sum Andrass F. Joensen vil verða við, men bert 4 konfirmantar, 2 dreingir og 2 gentir. ***Dreingirnir eru:*** *Johan Joensen, Trøllanes og Johannes Hansen, Mikladal.* ***Genturnar eru:*** *Malena Simonsdatter, Trøllanes og Ellen Joensdatter, Mikladal.*

**Men av tí at endamálið hjá undirritaða ongantíð var árstalið í sær sjálvum tá eg nevndi hetta í prædikuni, men bert at vísa á, at páskadagurin 2005 uttan iva fór at verða ein hin størsti fagnaðardagurin í Mikladals kirkju í mannaminnir, vil eg ikki gera meira við hetta mál. Tí hetta var dagurin sum okkara trúføstu kirkjutænarar í Mikladals kirkju gjøgnum ein mannsaldur vónaðu at uppliva, men sum teir tó ikki fingu at uppliva. Teir vóru báðir sum ein opin søgubók og kundi eingin teirra minnast nakra konfirmatión í Mikladals kirkju. Heldur ikki høvdu teir hoyrt teirra forfedrar tosað um nakra konfirmatión í Mikladals kirkju! Tí var tað at vit mettu at tað var ikki óhugsandi at 1799 var tað rætta árstalið, men so var ikki. Men ærast tann, ið ærast vil!**

# Hurðasøla

**Hedvig Westerlund-Kapnas**

Í gjár kom ein ung kvinna og bankaði uppá hjá okkum. Hon bjóðaði okkum tekningar til sølu, sum hon sjálv hevur gjørt. Hon greiddi frá, at hon skal fáa myndlistafrálæru hjá einum listamanni vesturi í Vágum, og ætlar at fíggja sær uppihaldið í tveimum vikum við at selja myndirnar hjá sær.

Konan var vinarlig, høvisk, alt annað enn átroðkandi, og myndirnar vóru fínar í mun til tað hon bað um sum prís. Tað gleddi okkum at kunna keypa eina og stuðla henni í frálæruni og gera møguligt at hon kundi fáa listamannakontaktir í Føroyum.

Nú lesi eg á portalinum, at viðkomandi er handtikin og situr í varðhaldsfongsli meðan avgjørt verður, um hon skal verða víst av landið.

Hvussu ógvisligar avleiðingar kann tað fáa, at royna at vinna smápening (200 kr fyri eina mynd, sum nógvar arbeiðstímar eru investerað í)? Hvar eru proportiónirnar? Hevur útlendingastýrið og fútan einki betri at fáast við?

Ikki ein vika gongur, uttan at onkur kemur framvið og roynir at selja okkurt - vanliga lutaseðlar. At ávara um onkur selur ólógliga er sjálvandi ein skylda hjá fútanum, men eg vóni at bløðini hava misskilt restina av søguna!

# Áminning til Hans Paula Strøm

**Maria Jacobsen**

**Áminning um spurningar viðv. og innlit í kanning av barnaverndarmáli.**

Av tí at eg ikki enn havi fingið svar frá tygum uppá skriv mítt til tygara frá 12.04.2005 viðv. omanfyri nevnda máli, fari eg við hesum at minna á, at eg í skrivinum setti tygum 4 nágreiniligar spurningar viðv. kanningini og somuleiðis bað um innlit í kanningina.

Eg fari at biðja tygum svara spurningum mínum og fari at minna á freistina smb. § 16, stk. 2, í løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993 um innlit í fyrisitingina.

Havi eg ikki frætt frá tygum í seinasta lagi fríggjadagin 13.05.2005 verður farið víðari við málinum.

Avrit av hesum skrivi er sent Dimmalætting og Sosialinum.